# Sosialurin VARPIÐ

FRÍGGJADAGUR 06. oktober 2006



**For Love of the Game** DR1

Kevin Costner hevur høvuðsleiklutin sum baseball-stjørnan, Billy. Beint undan seinasta dystin á árinum fær hann at vita, at hann er settur á sølulistan, og at gentan er farin frá honum. Einasti møguleiki hansara er nú, at hann spælir sín besta dyst nakrantíð.

**Leygardagin kl. 20.30**

**Skjótir pengar** 3 VIASAT

Tá ein maður - íløtin sum klovnur - ætlar at ræna bankan, verður hetta ikki tikið í álvara alt fyri eitt. Við hjálp frá nøkrum vinum eydnast ránið kortini, og tað gongur ófatuliga lætt at flýggja. Avbjóðingin kemur, tá tey trý skulu rýma út til flogvøllin í New York, tí tað er ikki bara sum at siga tað. Bill Murray, Geena Davis og Randy Quaid hava høvuðsleiklutirnar í filminum.

**Mánadagin kl. 24.00**





**Stalin og sonur** CANAL+

Australski politikkarin, Joe Welch, er í eini samleikakreppu. Og tað er nú ikki so løgið. Í 50'unum var kommunistiska mamma hansara saman við Josef Stalin. Og tað er ikki óhugsandi, at Joe er sonur russiska einaræðisharran.

**Hósdagin kl. 1.00**

Televarpið

Fleiri rásir - einki roks

**Filmir í hópatali • Barnasendingar • Dokumentar • Náttúra • Tíðindi alt samdøgrið**